## Heimsins minsta mamma

Enska Christianne Ray er uttan iva heimsins minsta mamma. Tann bara 88 sentimetur høga kvinnan átti herfyri eina dóttir, sum fekk navnið Kyrsten. Hon var 35,5 sentimetrar long og vigaði 2040 gram. Og tað er væl rímiliga proportionalt, tí pápin er 1,93 sentimetrar høgur. Stolta Christianne sigur, at hon fegin setti lívið í váða fyri at gerast mamma, og tað gjørdi hon sanniliga, tí læknarnir mæltu upp á tað harðasta frá, at hon bar barn undir belti. Men nú fegnast eydnusama familjan um lítla undurið, skrivar enska blaðið The Sun.



## Eingi siglingarljós

Ferðafólk umborð á Rituni gjørdust heldur bilsin, fyri ikki at siga skøkk, tá skipið mitt á vágni sló heldur harðliga bakk. Nú er bert loyvi at sigla fýra míl innan fyri molan, og ta ferðina helt skiparin á Rituni seg eisini til. Knappliga sóu ferðafólk ein alibát fara aftur við stýriborðs síðu heilt tætt við. Tað vísti seg, at alibáturin sigldi við ongum siglingarljósi, og tá talan var um túrin klokkan 16.20 av Havnini til Nólsoyar, er rættiliga myrkt hesa tíðina. Tí hevði sá skiparin á Rituni ikki alibátin fyrr enn í síðstu løtu, men av tí at hann sigldi so spakuliga, slapst undan samanstoyti.

# Víktu ikki frá freistini



*Tingið vildi ikki víkja frá tíðarfreistini, og tí verður neyðugt við trimum fundum við trimum døgum ímillum fyri at fáa avgreitt bráfangis fíggjarlógina fyri 2008*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Minni enn hálvan tíma tók tað tinginum í gjár at avgreiða tey bæði málini, sum lógu á skránni**

POLITIKKUR

*Leo Poulsen*

*leo@sosialurin.fo*

Tað var eingin tinglimur, sum tók orðið, tá onnur viðgerð av uppskotinum um eykafíggjarlóg kom fyri í tinginum seinnapartin ígjár. Allir 29 tinglimirnir, sum møttu, atkvøddu fyri uppskotinum, sum sostatt varð sent til triðju viðgerð.

Næsta mál á skránni var broyting í tingskipanini. Hetta er eitt mál, sum neyðugt verður at avgreiða, tí annars ber stutt sagt ikki til at seta tingið eftir valið í januar. Og her tóku so tríggir tinglimir orðið.

Allir tríggir høvdust at framferðini í sambandi við uppskotið um at gera Føroyar til eitt valdømi, og Henrik Old boðaði frá, at hann atkvøddi ikki fyri. Eisini Kristian Magnussen og Jógvan við Keldu filtust á, at nevnda uppskot varð skundað ígjøgnum.

Atkvøðugreiðslan vísti, at 20 atkvøddu fyri, fimm ímóti og fýra atkvøður vóru blankar, og sostatt fór eisini hetta uppskot til triðju viðgerð.

Seinasta punkt á skránni var framløga, og hetta skuldi havt verið bráfeingis fíggjarlóg fyri 2008. Tað skiltist á lagnum, at partar av Sambandsflokkinum vildi hava tingið at víkja frá tíðarfreistini, og formaðurin spurdi, um tingið var sinnað at víkja frá hesum tíðarfreistum.

Men tað var tingið ikki. 13 atkvøddu fyri, 15 ímóti og tvær atkvøður vóru blankar. Fyri at víkja frá tíðarfreistini skulu tríggir fimtingar av møttu tinglimum atkvøða fyri, so tað var langt frá nóg stór undirtøka.

Hetta merkir, at nýtast skulu minst tríggir fundir við trimum døgum ímillum, umframt helst eina nevndarviðgerð, áðrenn bráfeingis fíggjarlógin kann samtykkjast.

Tað skiltist á nøkrum tinglimum, at hetta við at víkja frá tíðarfreistum í sambandi við bráfangis fíggjarlógir var einki gott hugskot.

- Soleiðis var skilið í 2004 júst við einari bráfangis fíggjarlóg, tá tingið veik frá tíðarfreistini við tí úrsliti, at útreiðslurnar púra ótarnaðar vórðu sleptar leysar. Hetta tí at tingmenn ikki fingu tíð at seta seg rættiliga inn í uppskotið. Nú skuldu vit so avgreiða eitt uppskot, sum vit ikki hava sæð, áðrenn fyrsta viðgerð byrjar, vísti onkur tingmaður á.

Hvussu er og ikki, so kann tingið í fyrsta lagi avgreiða bráfangis fíggjarlóg við triðju viðgerð 20. desember. Og tá er bert kravda tíðarfreistin millum viðgerðir sett av til nevndarviðgerð. So tingfólk fáa lítil fyrr jólafrí enn vit flestu onnur.

Næsti tingfundur verður fríggjadagin, tá triðju viðgerðirnar av eykafíggjarlógini og broyting í tingskipanini koma fyri, umframt fyrsta viðgerð av bráfangis fíggjarlóg fyri 2008.

# Liggur í teirra hondum

**Tað skal finnast ein loysn fyrr ella seinni, og nær tað verður, liggur í hondunum á samráðingarpørtunum**

SEMING

*Leo Poulsen*

*leo@sosialurin.fo*

Verkfallið, sum Fiskimannafelagið hevði boðað frá at byrja klokkan seks í morgun, varð útsett av semingsmanninum, tá hesin kom upp í samráðingarnar í gjárkvøldið.

Terji Sigurðsson, semingsmaður, sigur, at hann hevur havt samband við partarnar seinastu vikuna, og at hann nú fer at fyrireika seg til at kalla partarnar saman aftur.

- Eg fari at nýta vikuskiftið at umhugsa støðuna, og fari at hava samband við partarnar eftir tørvi. Mánadagin ætli eg mær so at kalla partarnar saman aftur til samráðingar, sigur Terji Sigurðsson.

Hann viðgongur, at langt er millum partarnar, men ein semja skal finnast fyrr ella seinni.

- Tað er sjálvandi trupult at siga, nær ein semja fæst. Men jú fyrr hon fæst, jú betur. Hetta er tó heilt upp til partarnar at gera av, sigur Terji Sigurðsson.

Og tað er fyri so vítt tað, ið semingsmaðurin í løtuni veit at siga.



*Terji Sigurðsson, semingsmaður, heldur tað verða trupult at siga, nær ein semja fæst, men hann vónar at tað verður fyrr heldur enn seinni*